## Byggiklárt til trý øki

**Sandur:** Nú er liðugt at planera uppi í Nesinum á Sandi. Har hevur verið arbeitt við hátrýsti fyri at planerað tey trý ovastu grundstykkini seinastu tíðina, skrivar bkv.fo. Har var eitt stórt spreingiarbeiði, ið skuldi gerast, og arbeiðið hevur tikið einar tríggjar vikur. Articon hevur planerað øll trý. Maskinurnar teir nýttu vóru bæði stórar og tungar, so nýasfalteraði vegurin er illa farin av maskinunum. Nú eru tey so øll trý byggiklár. Einans eitt grundstykki er óplanerað í Nesinum nú.



## Høvdu besta alda toskin

**Noreg:** Steinar Eliasen er errin av, at fyritøkan hjá honum hevur vunnið heiðurin at hava besta alitoskin í Noregi. - Vit eru sera væl nøgd. Eg gevi Lofilab, sum hevur latið yngulin og Storfjord, sum hevur alt fiskin, alla æruna fyri heiðurin. Steinar Eliasen sigur, at felag hansara vann heiðurin fyri besta toskin við 153 stigum móti teimum 119, sum felagið á øðrum plássi fekk. - Vit hava vunnið kappingina um besta alitoskin í Noregi, og tað eru vit sera errin av, endurtekur hann. Tey, sum mettu um dygdina, hugdu at liti, kjøti, lukti, konsistensi, smakki og saftigheit í fiskinum. Tað er fiskeribladet.no sum ber hesi tíðindi.

# Økið er klárt - sleppa ikki at byggja

**75 spentir borgarar í Kaldbak og Havn bíða eftir einum svari uppá, nær tey sleppa at byggja sethús Inni á Fløtum í Kaldbak. Tey halda seg hava bíðað nóg leingi, og ynskja nú eitt greitt svar frá kommununi**



- *Vit bíða framvegis eftir einum svari um, nær vit sleppa at byggja her Inni á Fløtum, sigur Pauli Nolsøe*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

> *Vit eru hóast alt fleiri, sum helst vildu sloppið í gongd í gjár*
> *(Pauli Nolsøe, Kaldbak)*

BYGGING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kaldbak:** - Ja, eg havi spurt ferð eftir ferð. Og líka so ofta, sum eg havi spurt, eri eg farin vónbrotin avstað aftur.

- Tað er eingin í kommununi sum kann svara uppá henda týðandi spurningin: Nær sleppi eg at byggja? Og nær fáa hini boð um tað sama?

Meðan kaldbaksmaðurin Pauli Nolsøe og familja hansara bíða eftir hesum svari, leiga tey í Kaldbak. Men tey eru farin at ótolnast eftir einum svari.

Óteljandi ferðir hevur hann tosað við fólk í umsitingini í Tórshavnar Kommunu. Og fyri honum vísir tað seg, sum um eingin vil taka ábyrgd fyri hesi útstykkingini.

Hann sendi enntá ein teldupost til borgarstjóran, Heðin Mortensen stutt undan løgtingsvalinum í heyst. Men sjálvt ikki haðani fekk hann svar.

- Hjá mær hevur tað verið sum at renna frá Peri til Pól. Og fyri hvønn dag sum gongur, verður tað jú ikki bíligari, slær hann fast.

Eftir ætlan verða 10 grunddøki í hesi nýggju útstykkingini í Kaldbak.

### Eingin tíðarætlan

Øll henda útstykkingin Inni á Fløtum bæði kundi - og skuldi - langt síðani verið liðug.

Var rætt atborið, kundu teir fyrstu stoypibilarnir longu verið her og møguliga kundu ein eisini hoyrt tey fyrstu hamarsløgini frá ídnum handverkarum. Soleiðis er ikki.

Á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu varð greitt frá hesi ætlanini í juli mánaði 2007. Tá varð kunngjørt, at ein útstykking varð í gerð í Kaldbak við íalt 10 grundøkjum.

Í summar vóru teir í ferð við at gera vegin til hesa nýggju útstykkingina. Samlaði kostnaðurin fyri projektið er 2,9 mió krónur.

Sagt varð eisini, at fleiri umsóknir vóru til grundøkini í Kaldbak. Eftir ætlanini skuldi arbeiðið verða klárt í november mánaði, soleiðis at fólk kundu fara undir at byggja um ársskiftið – altso 2007/08.

- Men vit bíða framvegis eftir svari, sigur ein heldur ótolin Pauli Nolsøe, nú hann í næstu viku kann skriva 1. mars í kalendara sín.

### Ymisk svar

Pauli var ein av teimum – nú íalt 75 fólkunum – sum søkti um at fáa grundøki í heimbygdini. Hann var tí sera spentur og vónarfullur, tá arbeiðið byrjaði fyri einum ári síðani.

Hann spurdi seg fyri hjá kommununi og fekk at vita, at arbeiðið fór skjótt at vera liðugt. Boðini ljóðaðu at tað varð liðugt í summar, eftir summarferiuna, í heyst og í seinasta lagi fyri jól.

Fyri at leggja enn størri orku og álvara í fyrispurningar sínar, legði hann eisini málið fyri tað staðbundnu Kaldbaksnevndina. Her fingu tey at vita, at neyðugt var at gera eina frámatrikulering fyrst, og at tað tí var eitt sindur óvist um henda fyrsta tíðarætlanin fór at halda.

Menn vóru heldur ikki samdir um, hvørt henda frámatrikuleringin skuldi verið gjørd áðrenn ella aftaná.

Svarini frá umsitingini í kommununi vóru í øllum førum sera ymiskt.

Í dag standa Pauli og øll hini og bíða eftir einum nágreiniligum svari um, nær tey kunnu sleppa at byggja síni egnu hús Inni á Fløtum.

- Nei, tað er ikki serliga hugaligt at bíða, tá ein ikki veit um ein sleppur í gongd nú, í summar ella kanska vit mugu bíða heilt til jóla, sigur hann harmur á málinum.

### Í gongd í gjár

Pauli er kanska ikki hann sum er ringast fyri, í so máta, tí hann hevur hóast alt tak yvir høvdið í heimbygdini.

Sovítt hann veit, eru eini 13 onnur úr Kaldbak sum hava søkt um byggiloyvi á hesum staði. Og fyri hesi 14 er tað ein spurningur, um teirra umsóknir verða viðgjørdir á jøvnum føti við tær frá fólki, sum annars hava søkt um byggiloyvi í Havn. Talan er jú hóast alt um somu kommunu.

Hann er, sum vera man, ótolin eftir at sleppa at byggja síni egnu hús, men enn er mangt sum bendir á, at hann má brynja seg við toli og enn meiri toli.

Mong av hinum fólkunum eru í størri neyð. Tíverri fyri Kaldbak hava nøkur teirra funnið aðrar loysnir.

Pauli veit í øllum førum um fleiri sum eru flutt aðrastaðni at búgva, og haraftrat um onkran sum hevur keypt sær hús í Kvívík.

- Eg veit í øllum førum um tveir av umsøkjarunum, sum eru heilt desperat. Vit eru hóast alt fleiri, sum helst vildu sloppið í gongd í gjár, slær Pauli fast.

> *Pauli sendi enntá ein teldupost til borgarstjóran, Heðin Mortensen stutt undan løgtingsvalinum í heyst. Men sjálvt ikki haðani fekk hann svar*

## Eingin at hitta

Í Tórshavnar Kommunu er trupult hjá Sosialinum at fáa greitt at vita, nær hesi 75 umsøkjararnir fáa greitt svar um, nær tey sleppa í gongd við at byggja.

Onkurábyrgdarpersónur í umsitingini var burtur í morgun. Ein annar var sjúkur, og ein triði visti at siga, at tey bíðaðu bert eftir matrikuleringini av stykkjunum.

Sum skiltist skuldi tað ikki gingið so long tíð, fyrrenn fólk sluppu at byggja Inni á Fløtum í Kaldbak.

## Tríggjar mánaðir at avgreiða

Bíðað verður framvegis eftir teirri ætlaðu frámatrikuleringini av stykkjunum Inni á Fløtum.

Frá Umhvørvisstovuni fær Sosialurin upplýst, at tey hava enn ikki fingið nakra umsókn um hetta arbeiðið.

Sagt verður, at tað í miðal tekur tríggjar mánaðir at avgreiða eina slíka matrikulering.